# Landskappingin á veg í sjónvarpið

**Í FSF verður arbeitt við at finna høvuðsstuðul til landskappingina og møguleikanum fyri, at ein dystur í hvørjum umfarinum skal sjónvarpast**



*Áðrenn farast kann undir eina møguliga sjónvarpan av dystum, skal FSF hava loyvi at senda frá hesum, staðfesti Óli Holm á aðalfundinum*

*mynd: www.football.fo*

FSF AÐALFUNDUR

*Jóannes Hansen*

Tað ljóðaði fyri nøkrum árum síðani um hetta. Tá spurdist einki burturúr, men nú er tað aftur á skránni. Sambært frágreiðingini, sum FSF formaðurin Óli Holm helt á aðalfundinum leygardagin, so er ætlanin hjá FSF, at landskappingin skal eiga ein høvuðsstuðul. Tað fer at hava við sær, at landskappingin fer at hava nýtt heiti á sama hátt sum kappingarnar í hondbólti fyri stuttum fingu tað, og sum tað seinnu árini er vorðið vanligt í fótbóltskappingum í øðrum londum.

– Arbeiðið við hesum gongur sum ætlað, og vit vóna at koma undir land við eini loysn innan alt ov rúma tíð, upplýsti FSF formaðurin.

Sambært ársfrágreiðingini so hevur FSF havt samband við Sportfive, sum er felagið, ið eigur rættindini at sjónvarpa frá landdystunum hjá Føroyum, og SvF við tí í hyggju at fáa í lag sjónvarping frá 1. deild hjá monnum. Televarpið hevur eisini víst ávísan áhuga fyri ætlanini.

– Í fyrsta umfari er ætlanin hjá okkum at fáa sent beinleiðis frá einum dysti í hvørjum leikumfari, og at hetta skal ganga upp á skift millum feløgini, segði Óli Holm.

### FSF vil hava loyvini

Enn ber ikki til at siga nakað um, hvussu fíggjarligu viðurskiftini verða í hesum sambandi. Tvær høvuðstreytir mugu fáast upp á pláss, áðrenn tað fer at bera til at fara víðari við ætlanini.

Onnur er, at feløgini geva FSF sjónvarpsrættindini til 1. deildardystirnar, soleiðis at tað fer at bera til hjá FSF at gera serstaka avtalu við Sportfive, sum síðan fer at gera avtalu við sjónvarpsstøð.

Hin treytin er, at peningur verður fingin til vega, soleiðis at tað fer at bera til at gera íløgu í ein SNG vogn, sum tað verður nevnt í frágreiðingini. Hetta er stóri bilurin, sum altíð er at síggja uttanfyri, har tað verður sjónvarpað frá eitt nú fótbóltsdystum. At fáa ein sovornan bil við neyðuga innihaldinum er fortreytin fyri at verða førur fyri at senda beinleiðis og við tí dygdini, sum er neyðug. Einki verður í frágreiðingini sagt um, hvussu stór tann íløgan verður roknað at verða.

FSF fer heilt skjótt at venda sær til feløgini, sum eru umboðað í 1. deild, har heitt fer at verða á feløgini um at geva FSF sjónvarpsrættindini.

Kyndil-Søljan 21-22(13-12)

# Um reppið hjá Kyndil

**Tað var um reppið, at kvinnurnar hjá Kyndli syrgdu fyri einum ógvuliga óvæntaðum úrsliti sunnudagin, tá ið tær høvdu vitjan av Søljuni úr Sandavági**



*Søljan slapp at arbeiða nakað væl harðari enn ætlað fyri stigunum, tá tær vitjaðu Kyndil sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SUNSET-KAPPINGIN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Søljan var stórfavorittur, tá ið tær sunnudagin dystaðust við Kyndil í høllini á Hálsi í Havn. Kyndil liggur næstaftast í deildini og hevur í veruleikanum bert ikki verið nær námind av at fáa stig móti liðunum í ovaru helvt av deildini higartil í ár, men sunnudagin var um reppið, at tær fingu stig móti Søljuni, sum roynir at vinna seg upp á eitt heiðursmerkjapláss.

### Gestirnir løgdu bragdliga fyri

Í byrjanini av dystinum sá tað annars út til, at tað Søljan fór at vinna ein rímuliga lættan sigur, tá ið tær eftir lítlari løtu løgdu seg á odda við fýra málum. Men Kyndil svaraði aftur og upp á fimm minuttir vóru tær komnar upp á javnt. Tað hevur styrkt um Kyndlaliðið, at veteranurin Lotte Sørensen er komin aftur á liðið, og millum annað prógvaði hon sunnudagin, at hon framvegis er ósvikaliga trygg, tá ið tað snýr seg um brotskøst.

Fyrri hálvleikur var rættuliga javnur, og hóast gestirnir úr Søljuni vóru á odda við tveimum málum stutt fyri hálvleik, so fekk Kyndil við einum sprelli beint fyri steðgin syrgt fyri, at tað vóru tær, ið fóru til hálvleiks við einari 13-12 leiðslu.

Var tað javnt fyri steðgin, so var tað ikki minni javnt í seinna hálvleiki. Tað var ongantíð meiri enn tað eina málið á muni fyrstu longu løtuna av hálvleikinum, men tá ið farið var undir teir seinastu tíggju minuttirnar, gjørdi Søljan ein vørr, sum í veruleikanum tryggjaði teimum sigurin. Kyndil var á odda 19-18, men við trimum málum á rað kom Søljan á odda 21-19, og hóast Kyndil minkaði niður í 21-20, so kom havnarliðið ongantíð upp á javnt aftur, og harvið reyk møguleikin fyri einum ella tveimum óvæntaðum stigum til Kyndil. Hinvegin vóru tær í Søljuni ógvuliga fegnar um, at tað eydnaðist teimum eftir tógvið stríð at fáa sigurin til høldar. Neyvan høvdu tær væntað sær so mikið harða mótstøðu, sum tær fingu frá vertunum.

**Kyndil-Søljan 21-22(13-12)**

**Kyndil:** Lotte Sørensen 6(4), Randi Wardum 4, Súsanna Petersen 3, Anja Midjord 3, Linda Weihe 2, Ann-Mari Wang 1, Kari-Ann Petersen 1, Hildur Høghamar 1

**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 6(1), Lina Andriulyte 5, Jana Jacobsen 3, Hertha Jónsdóttir Simonsen 3, Heidi Maria Akselsen 3, Fía Selma Nielsen 1, Kristianna Petersen 1

**Brotskøst:** Kyndil 5(4), Søljan 1(1)

**Útvísingar:** Kyndil 3, Søljan 4

**Dómarar:** Kári og Dánjal Hansen

# A venjarin verður veruleiki

**Í FSF rokna teir við, at UEFA um eitt hálvt ár fer at hava góðkent føroysku venjaraútbúgvingina á A støði, og Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen fara nú at standa fyri skeiðum rættað móti málverjum**

FSF AÐALFUNDUR

*Jóannes Hansen*

Í formansfrágreiðing síni á friðarliga aðalfundinum leygardagin visti Óli Holm at siga, at tað um ikki so langa tíð fer at verða møguleiki fyri at fáa prógv sum A venjari í Føroyum. Higartil hevr B venjaraprógvið verið tað hægsta, sum tað hevur borið til at lokið í Føroyum.

– Miðvíst verður arbeitt við at fáa UEFA góðkenning av A-stignum í FSF venjaraútbúgvingini. Umsókn er send UEFA um hetta, og tað verður roknað við góðkenning í seinasta lagi í summar. Ætlanin er, at tað skal farast undir A venjaraútbúgvingina í heyst, og fyrsta próvtøkan ætlast at verða á heysti í 2006. Fyri at røkka minstu krøvunum hjá UEFA er tað avgerandi, at venjarar við A prógvi verða settir við næstu árini, segði Óli Holm.

Í 2004 var fyrsta B próvtøkan sambært UEFA góðkenning í Føroyum. Grundskeið vóru á Tvøroyri, í Havnimi og á Toftum, og harafturat vóru eisini skeið í B1 og B2 og Slóðarin.

Áhugin fyri at taka lut í venjaraskeiðunum tykist vera góður. Í grundskeiðunum luttóku 44, í Slóðaranum luttóku 8, á B1 skeiðnum vóru 29, í B2 skeiðnum vóru 18, og 12 vóru til B próvtøku.

Sjey instruktørar eru í venjaraútbúgvingini hjá FSF. Teir flestu hava førleika til einsamallir at taka sær av B skeiðum.

Útbúgvingarnevndin gjørdi í fjør av at fara undir skeið fyri málverjar. Landsliðsmálverjarnir báðir - Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen - eru nú instruktørar í skeiðum fyri málverjar. Talan er um tvey skeið, sum verða nevnd M1 og M2, og fyrsta skeiðið verður í vár.